# Ríkur botnurin - fellur hamarin

***Striptease:*** *Um stripparararnir í Club 20 ella Kagganum fara úr undirbuksunum í sýningum sínum á ólavsøku, kann tað hava við sær, at resturatiónsloyvið hjá viðkomandi klubba verður ógyldað*

Rúnar Reistrup

Tað kann fara at hava øgiligar fylgjur fyri teir báðar klubbarnar, ið hava valt at skipa fyri stripptease á ólavsøku, um stripparararnir ikki ansa sær.

Petur Poulsen, varapolitikommiserur á Politistøðini í Havn, sigur, at løgreglan fer at fylgja væl við virkseminum í Kagganum og Club 20 á ólavsøku, og kemur tað fram, at stripparararnir eru farnir ov langt, so fellur hamarin.

Hinvegin er einki í vegin við at klubbarnir skipa fyri stripptease. Tað eru teir vælkomnir til, men greiðar reglur áseta, hvussu slíkt skal fara fram, og hesar reglur skulu haldast.

Varapolitikommiserurin sigur, at teir hava kallað báðar klubbarnar, ið skipa fyri stripptease á ólavsøku, inn til samtalu, har løgreglan ætlar at greiða gjølla frá, hvussu reglurnar eru. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at klubbarnir eru greiðir yvir galdandi reglur.

### Kynslutir skulu goymast burtur

Tær reglur, ið løgreglan í Havn fer at ganga eftir, hevur ríkispolitiovastin stungið út í kortið. Talan er um nøkunlunda somu reglur, sum eru galdandi í Danmark fyri slíkt virksemi.

Reglurnar áseta millum annað, tað skulu vera minst fýra metrar millum stripparan og áskoðararnar. Reglurnar áseta eisini, at ikki er loyvt stripparanum at vísa kynslutir sínar fram.

Við øðrum orðum skal eingin fara úr undirbuksunum, uttan so at eitt handklæði ella okkurt tílíkt er fyri har, ið innasta plaggið plagar at sita.

### Kom á hægsta stað

Gjáramorgunin tók løgreglan í Føroyum málið um stripptease í Føroyum upp, og eftir at tað hevði verið á hægsta stað og vent, var full greiða um, hvussu løgreglan skal bera seg at í sambandi við úrlatingartiltøkini um ólavsøkuna.

– Klubbarnir fáa at vita, at teir kunnu vænta sær vitjan, bæði av uniformkløddum løgreglufólki og av løgreglufólki uttan uniform, sigur Petur Poulsen, varapolitikommiserur.

Talan verður tó neyvan um at løgreglufólk vera í klubbunum alt kvøldið, tí tað er arbeiðstrýstið hjá løgregluni á ólavsøku ov stórt til.

### Steðga stripparanum

Løgreglan í Havn hevur boðað løgreglufólkum sínum frá, at koma tey til dømis inn í ein klubba, har ein strippari stendur uttan undirbuksur og vísir fram, skulu løgreglufólkini steðga tiltakinum umgangandi. Klubbin sjálvur verður tó ikki stongdur av teirri orsøk - í hvussu er ikki í fyrstu atløgu.

Men hvat seinni hendir eftir ein slíkan tilburð er ikki greitt. Reglur eru gjørdar til at fylgja, og verða tær ikki tað, so fær tað avleiðingar, sigur Petur Poulsen.

Ein av avleiðingunum kann sambært varapolitikommiserinum vera, at viðkomandi klubbi missir sítt resturatiónsloyvi, og tað má metast sum ein rættiliga umfatandi avleiðing.

Tað er ábyrgdin hjá klubbunum at stripparin ikki brýtur reglurnar. Hendan ábyrgd inniber bæði at greiða stripparanum frá galdandi reglum, og at steðga tiltakinum, um alt ikki fer rætt fram.

Í Sosialinum í gjár søgdu bæði Kaggin og Club 20, at ætlanin var at syrgja fyri, at stripparararnir ikki fóru út um mark í sýningunum á ólavsøku.

Sosialurin er vitandi um, at onkuntíð hevur eingin tráður verið eftir á stripparum, ið hava verið á palli í Føroyum, men sambært løgregluni skal eingin ræðast fyri at hetta fær afturvirkandi avleiðingar.

# Kabarettin rullar

*Í kvøld verður ólavsøkukabarettin frumsýnd. Sambært fyrireikarunum er nógv gott á skránni, men júst hvat er innihaldið, er enn ein loynidómur*

Rúnar Reistrup

Seinastu dagarnir hevur verið arbeitt mestsum nátt og dag í Sjónleikarhúsinum í Havn. Ólavøkukabarettin er á skránni og hevur verið tað í ein góðan mánað hjá fólkunum, ið skipa fyri henni.

Í kvøld skal alt fyrireikingararbeiðið vera liðugt og úrslitið roynast á palli í frumsýningini klokkan 19.00.

Men áðrenn tað, fær eingin at vita, hvat ið væntast kann. Kabarettfólkini halda kortunum tætt inn at kroppinum.

Okkurt ber tó til at siga um innihaldi í kabarettini, millum annað við at kaga í leikskránna, ið bleiv liðug fyri einari viku síðan.

At døma útfrá myndunum í kabarettskránni, so fáa føroysku prestanir eitt slag ella kanska tvey, meðan Paul Watson fær eina kæra hond. Sangirnir og onkrar av myndunum kundu bent á, at tey trý hugtøkini byrsur, skot og Klaksvík á onkran hátt verða samantvinnað í einum sketsji. Hvussu, er ikki greitt.

Fjakkaragenturnar, ið hetta farna hálva árið hava skrivað heim til ungdómsblaðið Krydd og sagt frá um lukt, muslimar og kamelar í Egyptalandi, fara, eftir tí sum hevur verið at frætt, eisini at fáa nógv oman yvir seg.

Forsølan av atgongumerkjum til kabarettina byrjaði longu mánadagin.

Sum altíð í sambandi við ólavsøkukabarettir er tað eitt sindur óvist nær seinasta sýning verður. Men sum er ætla tey at halda fram við at spæla til 1. august.

Verður stórur eftirspurningur eftir atgongumerkjum, fara sýningarnar helst at halda fram í nakrar dagar afturat.



*Lítil ivi er um, at føroysku prestarnir og teirra innanhýsis stríð fara at fáa pláss millum sketsjirnar á ólavsøkukabarettini. Her er tað Turpin Napoleon Djurhuus, ið venur mitt á havnargøtum*

*Mynd: Høgni*

# Gistingarhúsfelagið góðtikið sáttmálan

*Sáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri arbeiði á gistingahúsum, matstovum o. ø. hevur nú fingið vælsigning frá Gistingarhúsfelagnum, ið annars ikki vildi kennast við hann í farnu viku*

Rúnar Reistrup

Gistingarhúsfelagið fer nú at mæla limum sínum til at fylgja sáttmálanum fyri arbeiði á hotellum, gistingarhúsum og matstovum. Tað inniber millum annað, at nógv av virkjunum innan hesa vinnu nú skulu hækka starvsfólkalønirnar, so tær verða í samsvari við sáttmálan.

Gistingarhúsfelagið var á fundi við Føroya Arbeiðsgevarafelag týsdagin, og seinni út á kvøldið var so fundur millum Gistingarhúsfelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrum megin borðið og Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hinumegin.

Tá fundurin var lokin út á náttina, var semja millum partarnar, og Gistingarhúsfelagið fór í gjár undir at heita á limir sínar um at gerast limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og soleiðis binda seg til at fylgja sáttmálanum.

Sambært Jan Mortensen, skrivara í Føroya Arbeiðsgevarafelag, vóru bert smávegis broytingar gjørdar í sáttmálanum. Lønin, ið sáttmálin ásetir, er óbroytt, men okkurt er heft afturat viðvíkjandi lønunum hjá starvsfólki innan vinnuna.

Meira vil hann ikki siga, og sáttmálin í sínum nýggja líki er heldur ikki almennur, fyrr enn hann er lagdur fram fyri limirnar í Gistingarhúsfelagnum.









# Sig tað uttan rokning

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð. Við Føroya Teletíð fært tú eina telekonto, har tú við einum teletíðarkorti setir pening ella teletíð inná, soleiðis at tú frammanundan hevur rindað fyri tær samrøður, tú ætlar at gera.

Fyrimunirnir við Føroya Teletíð eru, at tú:

- Ikki rindar mánaðargjald
- Ikki fært telefonrokning
- Ikki hevur óvæntaða nýtslu

Við í haldinum eru ymiskar tænastur, ið eru ókeypis at stovna, sum t.d. boðtóni, parkering, vís nummar, SMS-tekstboð og samrøðuskifti.

Atgongd til Føroya Teletíð kostar einans 300,00 kr., her íroknað 100 kr. ókeypis teletíð.

Eftir hetta kanst tú keypa teletíðarkort á 100, 200 og 500 krónur - og tosa, uttan at hugsa um telefonrokningina...

***Kom inn í eina av Telebúðunum og fá meira at vita...***



FØROYA TELE

Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

petur & petur • 320870